# Vikarskrivstova bjóðar arbeiðsmegi

**Tær báðar Leona Nilssen og Eilin Jørgensen hava sett á stovn vikarskrivstovu, har fólk kunnu skrásetá seg og arbeiðsgevarar fáa skikkaða arbeiðsmegi**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Metstóri eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi hevur havt við sær, at fólk tora betur at bróta upp úr nýggjum og at leita sær aðrar leiðir á arbeiðsmarknaðinum. Hetta flytføri hevur eisini við sær, at kappingin um best skikkaðu starvsfólkini herðist, og noyðast tey, sum seta fólk í starv, at nýta alt meira orku og pening til at lýsa eftir fólki.

Men nú er vikarskrivstova sett á stovn, við júst við tí endamáli at fáa til vega skikkað starvsfólk.

- Vit venda okkum til arbeiðsgevarar og til fólk, sum ynskja nýtt starv, ella sum vilja vera vikarar. So okkara uppgáva er at finna skikkaðar umsøkjarar millum tey, sum eru skrásett hjá okkum, sigur Leona Nilssen, sum saman við Eilin Jørgensen hevur sett nýggju vikarskrivstovuna á stovn.

- Hetta letur eisini upp fyri, at fólk kunnu samanseta sær eitt meira flexibult arbeiðslív, har tey sjálvi gera av nær og hvar tey arbeiða, sigur Eilin Jørgensen.

Talan er um eina undirdeild av donsku fyritøkuni Temp-Team, sum hevur deildir í 16 londum. Hetta ger, at tað eisini ber til at fáa fólk hendan vegin úr útlandinum, og at fáa føroyingum starv uttanlands.

## Matcha fólk

Ætlanin er, at umsøkjararnir koma til samrøðu hjá vikarskrivstovuni.

- Soleiðis læra vit ynski teirra at kenna og hava starvsprofilin og cv'ið liggjandi, til onkur arbeiðsgevari leitar eftir fólki við júst teimum førleikunum og ynskjunum, sigar tær báðar. Og tær greiða frá, at tilboðið er bæði til teirra, sum eru í starvi, men sum kundu hugsað sær at skift kós, og til teirra, sum ikki eru í vinnu. Eisini headhunta tær starvsfólk, sum eru í starvi



*Flytføri á arbeiðsmarknaðinum hevur við sær, at kappingin um best skikkaðu starvsfólkini herðist. Nýggja vikarskrivstovan fær til vega skikkað starvsfólk til virki og fyritøkur.*

aðrastaðni, men sum hava júst teir røttu førleikarnar til kundan.

Ítøkiliga matcha tær starvsfólk og arbeiðsgevarar soleiðis, at tá fyritøkan hevur greitt frá tørvinum, leita tær nakrar skikkaðar umsøkjarar fram. Um onkur umsøkjari er áhugaverdur, kunnu tey bjóða inn til samrøðu. Soleiðis sleppa arbeiðsgevararnir undan øllum roksinum og kostnaðinum víð at lýsa eftir fólki og at fyrihalda seg til eina rúgvu av umsóknum, sum skulu hava svar.

Í nýggju vikarskrivstovuni, sum eitur TT, verður onki goldið, fyrrenn uppgávan er loyst og fyritøkan hevur fingið rætta starvsfólkið.

## Undirbjóða ikki

Aðrastaðni frá kenna vit vikarskrivstovur, sum bjóða vikarar til eitt nú heilsuverkið, men har lønarlagið eisini er væl hægri enn hjá teimum, sum eru í føstum starvi. Tær báðar siga, at tær halda seg til sáttmálarnar á arbeiðsmarknaðinum, og at tær kunnu ikki bjóða arbeiðsgevarunum arbeiðsmegi fyri undirprís. Annars eru lønarviðurskiftini eitt mál millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara, til dømis í mun til leiðarar í privatu vinnuni.

Tær báðar siga, at tær vórðu varugar við, at nógv fólk eftirlýstu eina vikarskrivstova.

Bæði Leona og Eilin eru útbúnar skrivstovukvinnur, og eru eisini ávikavist laborantur og lærari. Vikarskrivstovan heldur til í Niels Finsens gøta 37, í húsunum har MAP arkitektar vóru.


# KT-fólk til Atlants Tøkni

Virksemið hjá KT-fyritøkuni Atlants Tøkni er í støðugari menning, og søkt verður nú eftir einum KT-serfrøðingi og einum KT-forritara til starvsfólkahóp okkara.



## KT-serfrøðingur

Tú hevur fleiri ára royndir at menna ritbúnað. Harumframt hevur tú:

- Hægri útbúgving í KT, tvs. embætisprógv ella ph.d.
- Sjálvstøðugt arbeiðslag
- Áræði, hug og evni áhaldandi at tilogna tær nýggja vitan og tøkniligar førleikar

Tann, ið fær starvið, fer at:

- Hava tøkniligu ábyrgdina av verkætlanum
- Standa fyri arbeiðinum at byggja upp KT-skipanir frá grundini
- Leggja til rættis og ganga á odda, tá nýggjar loysnir skulu mennast

## KT-forritari

Tú hevur útbúgving í KT (bachelor, kandidat ella líknandi) og helst eisini royndir á økinum. Ert tú um at gera útbúgving tína lidna, hoyra vit eisini fegin frá tær. Arbeiðið fevnir um at menna KT-skipanir í breiðum týdningi.

Tann, ið fær starvið, verður við í nýskapandi verkætlanum og gerst partur av einum fakliga mennandi arbeiðsplássi. Tøkniligu starvsøkini eru:

- .NET
- Visual Studio
- C++
- C#
- Oracle
- Java
- JDeveloper

Fyri bæði størvini er galdandi, at ein fær góða løn, ið svarar til førleikarnar. Send okkum umsókn við prógvum, CV og øðrum viðkomandi.

**Atlants Tøkni** · Jónas Broncksgøta 35
Postsmoga 277 · FO-110 Tórshavn
Tel 347 280 · Faks 347 281
att@att.fo · www.att.fo

NEMA

*Atlants Tøkni er partur av NEMA, ið er størsta KT- og samskiftissamtak í Føroyum og veitir fullfíggjaðar tænastur innan KT, skrivstovuútgerð og samskifti.*

Atlants Tøkni

REPROZ